VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Regn av og á og hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í andøvsgul av norði og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri og regn. Lyggjari.

Gott við kunning um royking

- Tað er altíð gott at fáa kunning um vandarnar við royking, sigur Jón Magnusson úr Haraldsundi.

ROYKING
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Klaksvík: Jón gongur í 9 A í Ósáskúlanum, og í morgin verður serstakt tiltak fyri skúlarnar í býnum.

Tá fara nevniliga næmingarnir í 6. til 9. flokk at luttaka í ársins átaki ímóti royking í hølunum hjá KFUM&K í Klaksvík.

At hava slíkt tiltak heldur Jón vera í fínasta lagi:

- Í mínum flokki roykja 8 av 22 næmingum. Kanska fleiri fara at hugsa um vandan við royking, tá tiltakið er liðugt, sigur hann við Sosialin.

Spurningurin er so, um talið av roykjarum í hansara flokki fer at minka eftir átakið í morgin.

- Tað er so altíð gott at verða kunnaður um, hvat royking er, slær hann fast.

Við átakið í morgin er ætlanin at gera nógv burtur úr. Við ymiskum framløgum er ætlanin at eggja næmingunum til at steðga roykingini.

Á skránni er millum annað ein heilsan frá sjálvum løgmanni, Jóannes Eidesgaard sum hevur verið roykfríur í eitt ár.

Møguleiki verður eisini at luttaka í fjøltalvi ímóti ársins ítróttarmanni, telvaranum Helga Dam Ziska, eins og vísusangarin Hanus G. Johansen fer at syngja.

- Kanska fleiri fara at leggja av nú, sigur Jón Magnusson í 9. A í Klaksvík
Mynd: Høgni Thomsen

Átakið í morgin miðar eftir at gera skúlarnar í Norðoyggjum roykfríar. Kanska eydnast tað hesaferð
Mynd: Høgni Thomsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-11
Nuuk	0
Qaqortoq	1
Ammassalik	-3
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-1
Seyðisfjørður	1
Tórshavn	5
Lerwick	5
Aberdeen	8
London	8
Tromsø	--
Bergen	3
Oslo	--
Stokkhólm	0
Keypmannah.	2
Helsinki	-9
Moskva	0
Berlin	7
Warzawa	0
Kiev	1
Bukarest	8
Paris	10
Madrid	9
Róm	10
Malorca	9
Athen	14
Malta	16
Tunis	18
Beijing	5
New Dehli	17
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	--
New York	-5
Miami	20
Los Angeles	22
Meksikobýur	15
Panama	33
La Paz	17
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 960 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani fer um Føroyar fríggjanáttina.



Í dag:
Lágtrýstið við Írland fer spakuliga norðureftir. Brúgvalagið norðan fyri Føroyar fer í útnyring

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 21/2 kl. 06^{00}– 22/2. 06^{00}. Hitin í gjár: 2,9°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í januar: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 11/2 kl. 06^{00}– 12/2 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í februar: 25,0 mm

Brúðarlín
v/Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

GEVIÐ BLÓÐ

Sosialurin
- altíð eitt tiltak miðlahúsinum
Tiltøk í februar
24. februar
Aglow

VESTFALLSKYRRINDI

17. februar	Tendring
19. februar	Mánin næstur jørðini
24. februar	Fyrra kvarter

Kelda: Ámanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
22. Febr	10.10	22.36	09.10	21.36	09.25	21.51	-	12.10	00.45	13.10	08.25	20.51	07.25	19.51	10.25	22.51	11.25	23.51	09.55	22.21	11.10	23.36
23. Febr	11.02	23.29	10.02	22.29	10.17	22.44	00.36	13.02	01.36	14.02	09.17	21.44	08.17	20.44	11.17	23.44	-	12.17	10.47	23.14	-	12.02
24. Febr	-	12.11	11.11	23.52	11.26	-	01.29	14.11	02.29	15.11	10.26	23.07	09.26	22.07	-	12.26	00.44	13.26	11.56	-	00.29	13.11
25. Febr	00.52	13.34	-	12.34	00.07	12.49	02.52	15.34	03.52	16.34	11.49	-	10.49	23.31	01.07	13.49	02.07	14.49	00.37	13.19	01.52	14.34
26. Febr	02.16	14.43	01.16	13.43	01.31	13.58	04.16	16.43	05.16	17.43	00.31	12.58	11.58	-	02.31	14.58	03.31	15.58	02.01	14.28	03.16	15.43